## VIÐMERKINGAR

# Nú verður grótið flutt

**Klaksvíkar býráð hevur tikið støðu til, at grót úr Norðoyatunlinum til verkætlanir í Klaksvík skal flytast um Leirvíksfjørð. Og verður tað at byrja sum skjótast**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** 160.000 rúmmetrar av gróti úr norðoyatunlinum skulu flytast úr Leirvík til Klaksvíkar. Afturímóti fær Leirvíkar kommuna 25 til 30 rúmmetrar av verjugróti, sum er í grótbrotinum í Klaksvíkar kommunu.

Hann sigur, at byrjað verður at flyta grót heilt skjótt, og so kann J & K Petersen fara í gongd við fjórða byggistig á góðshavnina í Ánunum.

Fjórða byggistig er atløgusíða. Dýpið framvið atløgusíðuni verður 12 metrar.

Steinbjørn sigur, at tá hendan verkætlanin stendur liðug, hevur Klaksvíkar kommuna eina fína atløgusíðu í Ánunum. Og sær hann fyri sær, at avskiping av serliga fiski fer at fara fram í Ánunum.

– Vit ætla ikki at fiskurin skal fara í gjøgnum tunnilin, tí tað er bakvent, at partur av fiskinum úr fiskivinnuhøvuðsstaðnum í landinum skal avskipast í Havn, heldur borgarstjórin í Klaksvík.

Hann ásannar tó, at sum gongdin í samfelagnum er, er góðshavnin í Ánunum í seinna lagi.

– Vit hava arbeitt so hvørt sum fíggjarlig orka er til tað, men jú, tað er rætt. Hon er í seinna lagi, sigur Steinbjørn, sum tó er bjartskygdur um virksemið við nýggju góðshavnina í Ánunum.

# Einki skil á viðurskiftunum hjá brekaðum

**Jón Ellendersen**



Eitt fyribrigdið hevur stungið seg upp í föroyskum politikki og samfelagsorðaskifti: Viðurskiftini hjá teim samkyndu verða mett sum gott kjakevni, somuleiðis verður vinnulívið mett sum gott kjakevni, meðan brekað og gomul verða mett sum eitt vánaligt kjakevni, tí tað gevur ikki eins nógv stig sum hini fyrru.

Ikki tí, at eg meti, at viðurskiftini millum samkynd og samfelagið og vinnulívið ikki skulu viðgerðast, men tá tað hendir, at tey fullkomiliga stjala myndina í einum valkjaki, tá er okkurt spinnandi galið í samfelagnum.

Neyvan er tað tí, at valevni og greinskrivarar ikki vita, hvussu viðurskiftini hjá teimum brekaðu og teimum gomlu eru í Føroyum - út av lagið vánalig. Ferð eftir ferð var tað í valstríðnum haft á loftið, og nærum í hvørjari valsending í Útvarpinum ringdi Elin Vang inn og segði valevnunum frá, hvussu mong fólk sótu við óviðgjørdum heilaskaða, í hesum føri apopleksi ella slag, sum tað eitur á føroyskum. Og viðurskifti teirra brekaðu vóru havd á loftið ferð eftir ferð uppundir valið, tí landsstýrismaðurin í almennamálum hevði spælt hasard við viðurskiftunum hjá teim brekaðu.

Nú hoyrdu vit í SvF herfyri, í sendingini "Ikki pláss fyri Martu", at formaðurin fyri felagnum DAMP í Føroyum segði, at hon ikki mælti til, at foreldur at børnum, sum vantandi høvdu DAMP ella AD/HD, ikki vendu sær til Sernámsdepilin á Frælsinum, tí har fingu tey onga staðfesting av hvat barninum bagdi. Foreldrini hjá Martu høvdu runnið sum rukkur í fleiri ár, men Sernámsdepilin hevði lítið annað at koma við, enn undanførslur og uttanumtos. Men tað var eyðsæð, at lítið skil var á deplinum.

Nú eri eg í teirri støðu, at hetta er ikki fyrstu ferð eg hoyri, at Sernámsdepilin ikki røkir sínar skyldur mótvegis teim brekaðu og avvarandi teirra. Óteljandi ung við heilaskaða vera vegna "vi alene vide" støðuna hjá deplinum, blakað runt í eini skipan, sum ístaðin fyri at vera teim skaddu og avvarandi teirra til hjálpar, gerast eitt satt haft um beinini. Og sama skilið er við fleir øðrum stovnum, sum avgera viðurskiftini hjá teim brekaðu.

Herfyri hoyrdu vit eisini um ein 5 árs gamlan drong, sum noyddist at fara av landinum, tí eingin hjálp fekst her heimi. Hesin drongur hevði eisini DAMP. Undanførslurnar vóru, at tey vóru í ferð við at gera okkurt. Men hetta er vána undanførsla, tí trupulleikin er minst 15 ára gamal. DAMP ella AD/HD er einki nýtt í Føroyum, og viðurskiftini hjá børnum við hesi diagnosu, eru ikki batnað tey seinastu mongu árini. Heldur eru tey versnaði. Og ikki kemst tað av, at vit ikki hava gott fólk at taka av, fólk, sum fegin vilja sleppa til verka. Nei, orsøkin er, at vit hava eitt almannaverk, sum einki skil er á. Eitt gott dømi var Marta, sum fekk Ritalin uttan nakra aðra viðgerð ella venjing, hóast tað nágreiniliga stendur í viðmerking frá læknanum, sum hevur ordinerað Ritalin, at tað má ikki gevast uttan samstundis rehabiliterandi tiltøk.

Eg liggi inni við eini søgu um eini foreldur og dóttir teirra, sum hevur fingið heilaskaða sum vaksin tannáringur. Dóttirin eigur sjálv børn, og øll søgan sum hon er, er ein gølusøga, ein skomm fyri alt tað føroyska almannaverkið. Søgan er merkt av líkasælu, persónligum aggi, vantandi samstarvi millum teir ymsu stovnsleiðararnar og fullkomnan blindleika. Hin heilaskadda gentan hevur verið bukað av sjeikinum ferð eftir ferð, somuleiðis er hann dømdur fyri harðskap av álvarsligum slag, men ikki einaferð hevur almannaverkið givið sær fær um hetta, men ístaðin givið sjeikinum øll rættindi og alla hjálp. Gentan hevur nærum onga hjálp fingið. Og tá tú lesur frágreiðingarnar frá ymsum "vitandi persónum" sum hava gjørt metingar av breki hennara, fært tú illgruna um, at almennaverkið ikki setur nøkur sum helst krøv um dugnaskap, royndir og eitt minimum av innliti. Tað er eins og fólk koma inn av vegnum og beint í arbeiði.

-----------------

Eg eftirlýsi við hesi grein eitt orðaskifti um viðurskifti teirra brekaðu, tí tað er ikki bert hjá teim sálarsjúku, at viðurskiftini eru so vánalig, at útlendsk feløg ætla at blanda seg uppí, hendir ikki okkurt. Nei, viðurskiftini hjá teim brekaðu sum heild eru so vánalig, at tað er stór skomm. Lítið nyttar at sita og gremja seg um viðurskiftini í Rumeniu, tá tey eru lítið frægari her.

# Fáa meiri burtur úr feskum fiski

**Á tekniska skúla í Klaksvík verður ein áhugaverdur fundur týsdagin 9. mars, har ljós verður varpað á, hvussu kann gerast fyri at fáa meiri burtur úr tilfeinginum av feskum fiski**

FUNDUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Á fundinum kemur millum annað Kári Hansen, reiðari á útróðrarbátinum Grunningi at greiða frá. Hann hevur arbeitt við hesum málinum í eina tíð og eru broytingar framdar umborð á Grunningi við atliti til innrætting, útbúnað og mannagongdum, sum gera tað lættari at fáa fiskin skildan eftir vekt, stødd og góðsku.

Til at stýra hesum, hevur Com-Data ment ein teldu-skipan (VML), sum skrásetur og skjalfestir allar upplýsingarnar um fiskaríið hjá Grunningi.

Á fiskivinnufundinum 9. mars verður møguleikin fyri at fáa meiri burtur úr feska fiskinum við útgangsstøði í royndunum, sum Grunningur higartil hevur gjørt, viðgjørdur.

Eisini verða umboð frá fiskivinnuni við á fundin-um, umframt at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø eisini er boðin við.

Og umboð frá Com-Data og Looknorth fara somuleiðis at greiða frá ávíkavist telduskipanini og menning av pakkitilfari. Fundurin byrjar klokkan 19.

# Hin sjúkuræddi

**Losjan Glotti er í hesum døgum karmur um skemtileikin Hin sjúkuræddi, sum hevði frumframførslu leygardagin tann 28. februar**

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Leikurin er um múgvandi mann, Argan, sum billar sær inn at vera sjúkur.

Hetta mala hansara tankar um meginpartin av tíðini, og apotekarar og læknar eiga stóran leiklut í lívi hansara. Teir fáa eisini av at vita, men sum Bèralde, bróðir Argans, einastaðni sigur um Molière og hansara sjónleikir: Tað er ikki læknunum, hann flennir at, men tí, sum er láturvert í læknakynstrinum.

Og sjálvandi er sjúkmamman í húsinum, sum bara er eftir pengunum hjá Argan, og fáa børnini út úr húsinum.

Alt snýr seg kortini ikki bara um sjúkur og læknar, fals , svik og býttisskap.

Har eru ung fólk, ið hava tokka til hvørt annað, og tær fløkjur, ið av tí kunnu standast. Eisini hetta leggur Argan seg útí. Hann vil hava lækna til verson. So er lækni jú í húsinum, og peningur at spara, og tað er ikki minni umráðandi.

Alt hetta rokið í húsinum, leggur upp til ein sera stuttligan leik.

Hin sjúkuræddi, Le Malade imaginaire, er skrivaður av Molière.

Molière var fransmaður. Hann varð føddur í 1622 og doyptur Jean-Baptiste Poquelin, men gjørdist kendur leikhøvundur og sjónleikari undir navninum Molière. Upprunaheitið á leikinum, sum fyrstu ferð varð framførdur í París í 1673, var Le Malade imaginaire. Molière leikti sjálvur høvuðsleiklutin, men longu á fjórðu framførslu gjørdist Molière sjúkur á pallinum. Hann varð fluttur til hús og doyði fáar tímar seinni.



Síðan tá er leikurin framførdur í París meira enn 1500 ferðir.

Leikurin varð framførdur fyrstu ferð í Keypmannahavn í 1724 við heitinum Den indbildte syge. Hetta er um tað mundi, Holberg var uppi við sínum sjónleikum.

Leikurin verður framsýndur í losjuni í Gøtu. Men tað eru ikki bara gøtufólk, ið hava verið við til at seta leikin upp. Leikstjórnað hevur gøtumaðurin Magni Poulsen, sum hevur drúgvar royndir við sjónleiki.

Saman við leikarum og øðrum, sum eru úr ávíkavist Saksun, Fuglafyrði, Tjørnuvík og Gøtu, hava tey fingið lív aftur í losjuna. Og hetta rokið heldur fram alla vikuna, hvørt kvøld kl. 20, uttan týskvøld og mikukvøld.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Inga Ellingsgaard:

# 40 ára starvsdag hjá Postverkinum

**Mánadagin 1. mars var ein hugnaløtu í kantinuni hjá Postverki Føroya á Óðinshædd í Havn í sambandi við at Inga Ellingsgaard, dagligur leiðar á lønardeildini, hevði 40 ára starvsdag**

Inga byrjaði tann 1. september 1962 á "Indleveringsposthus 1" í Holbergsgade í Keypmannahavn.

Eftir at hava verið á Post & Telegrafskúlanum fekk hon starv á Postgarðinum í Købmagergade, har hon var til 1970, tá hon fór í barnsburðarfarloyvi.

Í 1972 fekk hon starv á posthúsinum í Værløse, har hon var, til hon 1. mars 1977 fekk starv hjá Postverki Føroya, sum varð yvirtikið árið fyri.

Hennara starv er at avgreiða lønir og at avrokna millumlanda postflutning.

Meðan Inga arbeiddi hjá danska postverkinum, fekk hon sær útbúgving sum yvirkontórassistentur.

Hon er eisini virkin í kvinnurørðsluni og situr í NOKS (Nordiske Kvindeorganisationer i Samarbejde), sum er ein felagsskapur undir Norðurlandaráðnum. Í frítíðini spælir hon eisini bridge.

Inga er fødd á Kirkju á Fugloy, dóttir Palmu, f. Soldal, ættað úr Sumba, og Rasmus Rasmussen, vanliga nevndur Rasmus í Fugloy.

Hon gekk í skúla í Klaksvík og tók realprogv í 1960. Hon arbeiddi í handli og á Sjómansheiminum í Klaksvík, áðrenn hon fór til Danmarkar í 1962.

Hon er gift Einari Ellingsgaard, ið er ættaður av Eiði. Tey búgva í Havn og eiga tvær døtur, Randi, sum er lækni og býr Herfølge, og Beintu, sum er sjúkrasystir á Ríkissjúkrahúsinum, og býr í Keypmannahavn.

Inga og Einar eiga fýra ommu- og abbabørn.



*Inga Ellingsgaard 40 ára starvsdag hjá Postverkinum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Inga saman við Birnu Dahl og Svanbjørg Manai frá Frímerkjadeildini*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Roymer Lamhauge, deildarleiðari, og Johannes A. Ellingsgaard frá Frímerkjadeildini*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Inga millum tveir pensioneraðar deildarleiðarar, A.G. Nielsen og Mortan Rasmussen, ið er bróðir Ingu*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

## Dagurin

**4. mars. Adrianus**, deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.

Navnið merkir *maður úr Adria* í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum.

*Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.*

## Jarðarferð

Kistan við

**Hans Oluf Johannessen**
í Klaksvík

fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna hóskvøldið klokkan 18.00.

Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13.00.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Niels Peter Djurhuus**

andaðist mánadagin 1. mars 81 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju fríggjadagin 5. mars kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Jónleyg, Julius, Anna Sofía, Anvør og Femja**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jens Andrésson**
bussførari

andaðist týsdagin 2. mars, 79 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 6. mars kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Selinda, Signý og Hildur**